# ábyrgdarleys



*Tað er helst ongin ivi um, at einhvør øking í játtanini til tað føroyska sjúkrahúsverkið eru peningur út av vindeyganum, sum støðan er nú. Vit hava onga ætlan um hvat vit vilja við verkinum, vit hava onga ætlan um hvørjar sergreinir vit skulu hava í Føroyum, vit hava ongar ætlanir um hvørjir yvirlæknar skulu verða í Føroyum, vit hava onga ætlan um hvussu vit skulu reka tey trý lógarfestu sjúkrahúsini, so tey virka sum sjúkrahús og vit hava als onga ætlan um hvussu vit skulu liva upp til politiska viljan at hava trý vælvirkandi sjúkrahús í Føroyum. Hesin háttur at játta almennan pening er rættuliga ábyrgdarleysur og átti ikki at verið í einum framkomnum samfelagi, sigur Jákup Petersen*

búgving o.t. Í summun førum hevur hetta ført til størri engagement og produktivitet. Eyka deildarkontur, sum eru stýrdar av úrslitum eru eisini royndar. Her kann deildin fáa úr hesi kontu um hon framleiðir meira enn vanligt, og brúka tað til ymiskt á deildini og/ella úrslitar løn.

Ein annar háttur er sokallaða kontraktstýringin. Játtandi myndugleikin letur eina upphædd til sjúkrahúsið beinleiðis við atliti at hækka talið á eini serligari viðgerð.

Eisini kann gerast ein skipan har peningurin fylgir sjúklinginum. Her er neyðugt at sjúkrahúsini ganga frá tí gomlu uppgerðini sum kallast seingjardagakostnaður. Hetta kann jú ikki brúkast til nakað og sigur lítið um hvat aktivitet sjúkrahúsið hevur.

Um roknað verður eftir, hvussu nógv tað kostar at kanna og viðgera ymiskar sjúkur og skaðar, gerst tað lættari at roknað kostnaðin hjá sjúkrahúsunum. Í hesi skipanini er diagnosan í miðdeplinum. Sjúkrahúsið fær so pening alt eftir hvussu nógvar sjúklingar við ávísum diagnosum eru vornir viðgjørdir.

Henda skipan hevur tó stórar vansar. Sjúkrahúsini vilja undir hesi skipan hava sum stórsta áhugamál, at økja sín aktivitet við vanda fyri, at ov nógvar viðgerðir verða gjørdar. Játtanartrygdin viknar uttan at framleiðslan við vissu hækkar.

At enda kunnu játtandi myndugleikar og sjúkrahúsini heilt skiljast frá hvørjum øðrum. Undir rammujáttanini er tað í verunleikanum játtandi myndugleiki sum játtar til sín sjálvs.

Um sjúkrahúsini gjørdist t.d. sjálvsognar stovnar, kundi ein nevnd undir Landsstýrinum, vegna borgarnar, keypt tænastur frá sjúkrahúsunum. Nevndin setur so krøv um góðsku, virksemi, tænastu o.s.fr. Sjálvøum rakstrinum stendur tað síðani heilt til sjúkrahúsleiðslurnar at taka sær av.

Undir hesi skipan verða tað heilt greiðar spælireglur millum politikarar og sjúkrahúsini. Politikarnir seta, vegna borgarnar, krøv til sjúkrahúsini, men luttaka ikki í rakstrinum.

Meginparturin av omanfyri nevndu skipanum eru enn ikki egnaðar til heilt at koma ístaðin fyri rammujáttanina. Tað hevur tó stóran týdning at hesar skipanir eisini verða brúktar í Føroyum. At byrja við kann ein nútímansgjørd rammujáttan liggja sum botnur og oman á hesum skal so arbeiðast við skipanum so sum kontraktjáttan, peningur fylgir sjúklingi og við at skilja sundur millum játtandi myndugleika og sjúkrahúsini.

Tað er av stórum týdningi at øll trý sjúkrahúsini fara burtur frá seingjardagauppgerðini og yvir til diagnosuuppgerðina, so vit fáa kostnaðin fyri kanning og viðgerð av tí einstaka sjúklinginum við tí einstøku diagnosuni. Sum nú er ber illa til at sammeta virksemi á føroysku sjúkrahúsunum.

Harafturat er tað neyðugt, at vit fáa tamarhald á støðuni viðvíkjandi viðgerð uttanlands. Soleiðis at tað eisini her verður gjørd kostnaðarmeting fylgjandi diagnosuni fyri, at tann deild sum tekur viðgerðir heim beinleiðis kann rokna út hvussu nógvur peningur fylgir við. Fyrst tá kemur áhugi og ferð á heimtøku av viðgerðum.

**Tveita vit hvørt ár 100 mió. av skattakrónum út gjøgnum vindeygað?**

Tað er helst ongin ivi um, at einhvør øking í játtanini til tað føroyska sjúkrahúsverkið eru peningur út av vindeyganum, sum støðan er nú.

Vit hava onga ætlan um hvat vit vilja við verkinum, vit hava onga ætlan um hvørjar sergreinir vit skulu hava í Føroyum, vit hava ongar ætlanir um hvørjir yvirlæknar skulu verða í Føroyum, vit hava onga ætlan um hvussu vit skulu reka tey trý lógarfestu sjúkrahúsini, so tey virka sum sjúkrahús og vit hava als onga ætlan um hvussu vit skulu liva upp til politiska viljan at hava trý vælvirkandi sjúkrahús í Føroyum.

Sostatt eru tær 100 mió kr. sum sjúkrahúsverkið higartil hevur fingið í øktari árligari játtan, stórt sæð givnar út við vón um, at okkurt gott spyrst burturúr.

Hesin háttur at játta almennan pening er rættuliga ábyrgdarleysur og átti ikki at verið í einum framkomnum samfelagi.

# Umboðan okkara í Íslandi og Merkið

JASPUR VANG



**Tá eitt samt løgting fyri stuttum tók undir við at seta føroyskan umboðsmann í Íslandi, vóru tað ikki mong, ið hugsaðu, at loysingarsinnaðar afturhaldskreftir – nú við sjálvum Merkinum sum skálkaskjóli - fór at koma aftur um aftur, misnýta hetta høvið politiskt og enn einaferð royna at íbirta undirlutakent sundurlyndi í føroyska fólkinum og seta kílar í ríkisfelagsskapin.**

Endamálið við at seta føroyskan umboðsmann í Reykjavík eftir sama leisti sum umboðan okkara í ávikavist Brússel og London, er sjálvsagt at virka fyri føroyskum áhugamálum uttan fyri Føroyar. So einfalt er tað. Størri almenn føroysk umboðan í Íslandi er eisini natúrlig, eftir at Íslandssáttmálin er komin í gildi. Hesum tók eitt samt løgting undir við – eisini andstøðan. Tí er tað undrunarvert, at somu menn og somu flokkar, sum á løgtingi tóku undir við málinum, nú sum ketta upp úr høvdatrog koma aftur um aftur og í fjølmiðlunum seinastu vikurnar hava gjørt málið til ein spurning um, hvussu hesin umboðsmaður skal flagga. Tað kann ikki skyljast øðrvísi, enn at hesir opportunistar ov seint komu í tankar um, at her var enn eitt høvið til at royna at seta kílar millum ríkispartarnar. Teir skammast ikki við at nýta sjálvt Merkið sum skálkaskjól. Sitandi samgonga hevur skyldu til at taka støðu í ríkisrættarliga veruleikanum og standa fast, vísandi til, at ríkisrættarliga støðan er púra greið og at føroyingar á løgtingsvalinum fyri trimum árum síðani vendu fullveldissamgonguni bakið.

At lobbiistar úr heimliga og útlendska vinnulívinum eisini liggja framvið, hoyrir við til politiska spælið og mugu vit hava tá álit á sitandi samgongu, at hon, har tað er neyðugt við atliti til yvirskipaðu áhugamálini hjá føroysku tjóðini sum heild, gjøgnumskoðar snildirnar og er før fyri at standa ímóti lobbiistunum.

**Ikki fyri okkara bláu eygu skuld, men "cool business"**

Vit skulu gera okkum púra greitt, at hvørki íslendarar ella aðrar tjóðir fara at virka umvegis okkara komandi umboðan í Íslandi fyri okkara bláu eygu skuld ella fyri flagg okkara skuld. Talan er nevniliga um "cool business". Tað verður ikki avgerandi fyri útlendingar, sum fara at samskifta við okkara umboð í Íslandi, hvørt eitt ella tvey fløgg standa á trappusteininum. Føroysk umboðan í Íslandi eigur tí at hava eitt tætt og gott samstarv við donsku sendistovuna, sum eftir aldargamalt altjóða diplomatiskt virksemi hevur drúgvar altjóða royndir, gott samband við aðrar tjóðir, virðing og stóra ávirkan í útheimi, umframt stóra fíggjarorku. Føroyska umboðanin í útlondum er longdi armur landsstýrissins og skal tí hava neyðuga styrki og m.a. vera før fyri at skyna á, nær talan er um sjálvsókna vinnuliga lobbiismu ella undirgravandi politikk. Umboðsmaðurin skal tæna føroysku fjøldini. Tað hava løgting og landsstýri skyldu at tryggja.

**Tvey fløgg ein styrki**

Øll eru vit góð við merkið og hava størstu virðing fyri okkara tjóðareyðkenni. Tá fullveldismenn niðurgerandi tosa um kjallaravirksemi og føra fram, at tað er óvirðilgt, ússaligt og enntá ein skomm, at føroyska merkið skal veittra saman við øðrum fløggum á felags umboðsstovum uttanlands, royna teir at tala til undirlutakenslurnar í fólkinum og íbirta sundurlyndi í ríkisfelagsskapinum. Umframt at teir á henda hátt vanvirða og misnýta flagg okkara politiskt. Tó fara føroyingar neyvan at lata seg lumpa enn einaferð av afturhaldskreftum, sum snildisliga royna at taka patent uppá tjóðareyðkenni okkara.

**Vit mugu hava dirvið til at hugsað stórt**

Vit vilja vera við í alheimsgerðini og hava seinastu mongu árini verið vitni til, at lond, felagsskapir og vinnuvirkir leita saman tvørtur um ríkismørk og á henda hátt leita sær styrki í størri eindum. Í ríkisfelagsskapinum hava vit føroyingar styrki í stødd og hava, um vit bert hava dirvið til tess og kunnu semjast um tað, atgongd til enn størri felagsskapir – eitt nú Europasamveldið.

Møguleikarnir í ríkisfelagsskapinum eru nærum óavmarkaðir og liggja opnir fyri okkum, um vit bert ynskja at gagnnýta teir, eins og ríkisrættarligu viðurskiftini eru púra greið. Sum Sambandsflokkurin ferð eftir ferð hevur víst á, stendur okkum í boði at seta føroysk umboð á vælvirkandi sendistovur kring allan heim og á henda hátt m.a. gagnnýta upparbeidda professionalismu, drúgvar royndir, stødd og styrki í ríkisfelagsskapinum.

Sitandi samgonga skal venda fullveldisinnaðu afturhaldskreftunum bakið, vísa áræði og dirvið til at hugsað stórt, sjálv seta dagsskránna og gagnnýta fyrimunirnar í ríkisfelagsskpinum.

Á Tvøroyri
Grækarismessudag.


